Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 12. september 2003



**The World is not Enough**
James Bond fær til uppgávu at loysa ein maktkamp millum tvær óstøðugar tjóðir, ið báðar stýra oljukeldum, ið hava alstóran týdning fyri heimin. Hann verður settur í starv sum lívverji hjá Elektra King, dóttir til ein oljubarón, ið júst er myrdur.
**Sunnudagin kl. 20.00**



**Kissing a fool**
Max Abbitt er ein smartur og sjálvstryggur ungur ítróttar-journalistur. Barnavinurin hjá Max er tann smæðni høvundurin Jay Murphy, sum skrivar eina bók um supermodellina Natasha, ið knústi hansara hjarta. Ritstjórin hjá Jay, tann vakra og intelligenta Samantha, møtir Max. Tey fella fyri hvørjum øðrum og byrja at leggja ætlan fyri brúdleypinum.
**Mánadagin kl. 19.00**




**Ocean´s Eleven**
Danny Ocean leggur ætlan fyri aldarinnar ráni, sum er at rána eitt stórt Las Vegas-kasino, meðan ein eksklusivur nevaleikur fer fram. Sum hjálparmenn hevur hann 11 harðar fýrar, sum vága alt fyri at fremja vandamikla ránið. Millum leikararnar eru kend nøvn sum Geogre Clooney, Brad Pitt og Julia Roberts.
**Leygardagin kl. 19.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**